## Missa arbeiðið

At tað ikki einans eru fyrimunir við at fara upp í ES noyðast nógvir pólendingar at sanna.

Seinastu mánaðarnar hevur stjórnin framt nógvar broytingar í tí partinum av vinnulívinum, sum tað almenna eigur, og mikudagin samtykti hon at umskipa ta almennu námsvinnuna. Avgerðin ber millum annað í sær, at fýra kolanám har suðuri í landinum verða latin aftur. Hetta verður kortini ikki gjørt í einum, men í 2006 verður tað seinasta av teimum fýra námunum stongt.

Avleiðingin verður, at 28.000 kolanámsmenn missa arbeiðið. Stjórnin sigur, at 14.000 teirra fara frá við eftirløn, meðan 8.500 aðrir fáa tilboð um at endurútbúgva seg við fíggjarligum stuðuli frá tí almenna.

## Einki vatn

Tað hevur verið so turt har eysturi í Russlandi, at nógvastaðni er drekkivatnið farið at ganga undan.

Í havnarbýnum Vladivostok er støðan so álvarssom, at myndugleikarnir hava lýst býin í undantaksstøðu. Turkurin har á leiðini er tann ringasti seinastu 40 árini, og nú er so lítið vatn í áunum, at tað er ikki nóg mikið av drekkivatni til tey umleið 600.000, sum búgva í býnum.

Borgarstjórin í Vladivostok, Jurij Kopylov, hevur givið boð um at skamta drekkivatnið, og stjórnin í Moskva hevur lovað at gera sítt til at útvega fólkinum í býnum meiri vatn í kranarnar, sigur varaforsætisráðharrin Vladimir Jakolev.

## Smábarn doyði í bilinum

Svenska blaðið Aftonbladet veit at siga, at ein hálvtannað ára gamal smádrongur doyði í bilinum hjá pápa sínum, tí tað var vorðið ov heitt inni í bilinum, sum pápin hevði sett frá sær úti í túninum.

Hendingin var einastaðni har vesturi í Svøríki tann 31. juli, og tann dagin vóru 27 hitastig í skugganum har um vegir, skrivar Aftonbladet. Pápin lat tann lítla vera eftir í bilinum, meðan hann fór inn. Tá hann seinni fór út at hyggja til dreingin, var hann deyður. Læknakanningar staðfestu, at drongurin var deyður av tí nógva hitanum inni í bilinum.

Týsdagin var pápin til avhoyringar hjá løgregluni, men varð latin leysur. Mamman er eisini avhoyrd, men hon var til arbeiðis, tá vanlukkan hendi. Løgreglan sigur seg hava fingið at vita frá grannunum, at hetta var ikki fyrstu ferð, at foreldrini lótu tann lítla dreingin og eitt annað barn, sum tey eiga, sova í bilinum, sjálvt um tað var sera heitt í veðrinum.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# USA kúvendir í Irak-málinum



*Amerikonsku hermenninir megna ikki uppgávuna í Irak einsamallir. Tí noyðist USA nú at biðja onnur lond um hjálp.*

**Avgerðin hjá amerikonsku stjórnini at biðja altjóða samfelagið um hjálp í Irak, er ein kúvending í amerikanska politikkinum. Aftur fyri hjálpina skal ST fáa ein týðandi lut, tá Irak skal hava nýggja stjórn.**

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er latið upp í hendurnar á Colin Powell, uttanríkisráðharra at sannføra limalondini í ST-trygdarráðnum um, at tey eiga at hjálpa USA við hersetingini í Irak, og hann skal gera alt fyri at sleppa undan, at ósemjan, sum var undan krígnum í Irak, tekur seg uppaftur.

Men samráðingarnar verða truplar. Frakland hevur longu boðað frá, at landið krevur størri heimildir til ST enn tær, sum USA vil lata heimsfelagsskapinum. Men USA er í knípu og hevur stóran tørv á altjóða hjálpini, tí amerikanarar hava ásannað, at teir megna ikki at loysa uppgávuna í Irak einsamallir – hvørki hernaðarliga ella fíggjarliga.

Tað er fíggjarnevndin hjá Kongressini, sum hevur lagt ta nýggju leiðina og ikki stjórnin, og serliga verjumálaráðið Pentagon hevur sambært eygleiðarum havt ilt við at biðja umheimin um hjálp. Tað er einki loyndarmál, at Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, heldur lítið um ST, men sambært Washington Post hevur eisini hann skilt, at tað slepst ikki undan at biðja um hjálp.

USA hevur 140.000 hermenn í Irak og hevur ikki nóg mikið av tøkum hermonnum at senda hagar, tá hesir sambært reglunum hava rætt til at sleppa heimaftur. Tí vónar USA at fáa lond sum Turkaland, India, Pakistan og Bangladesh at hjálpa sær. Frakland og Týskland fara harafturímóti neyvan at senda hermenn til Irak, men fara helst at játta pening ístaðin fyri.

# Danskir fiskivinnubýir rópa neyðarróp

**Støðan í donsku fiskivinnuni er nú so ring, at teir stóru fiskivinnubýirnir rópa neyðarróp.**

FISKIVINNA

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Borgarstjórarnir í teimum størstu fiskivinnubýunum í Danmark kenna seg so ørkymlaðar av teirri ringu støðuni hjá fiskivinnuni, at teir vilja hava politikararnar á Christiansborg at gera okkurt.

Seinni í hesum mánaðinum fara teir at viðgera viðurskiftini á einum fundi, sum borgarstjórin í Hanstholm, Knud Størup, hevur tikið stig til.

– Nógvir fiskimenn eru so illa fyri, at teir eru um at fara á húsagang. Støðan er syndarlig, ikki einans fíggjarliga, men eisini sálarliga. Nú er støðan hjá vinnuni so álvarssom, at kommunurnar noyðast at taka málið upp og at vísa fiskimonnunum okkara stuðul, segði Knud Størup við tíðindastovuna Ritzau í gjár. Hann hevur verið borgarstjóri í Hanstholm í 25 ár og sigur støðuna hjá fiskivinnuni ongantíð hava verið so ringa sum nú.

Tí ætla hann og borgarstjórarnir í Esbjerg, Hvide Sande, Thyborøn, Skagen, Frederikshavn og aðrastaðni at koma á tal við politikararnar í Keypmannahavn um viðurskiftini.



**UTTAN ÚR HEIMI**

# Blair úti á politisku eggini

**Hann kom sum eitt frískt politiskt lot og gav veljarunum hjá Arbeiðaraflokkinum trúnna upp á eitt lív aftan á Margareth Thatcher. Nú stendur hann úti á eggini við bakinum úteftir. Kríggið í Irak og sjálvmorðið hjá David Kelly hava gjørt, at í dag vilja nógvir bretar sleppa av við Tony Blair - tess fyrr tess betur.**

POLITIKKUR

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



Tað mundi kennast sum ein sannur lætti hjá bretska forsætisráðharranum at sleppa í summarfrí í síðstu viku – ikki heima í Bretlandi, men í frítíðarbústaðnum hjá sjálvum Cliff Richard á Barbados. Nú slapp hann loksins burtur frá teimum áhaldandi meiningakanningum, sum vísa, at bretar hava ikki álit á honum longur orsakað av krígnum í Irak og sjálvmorðinum hjá vápnaserfrøðinginum David Kelly.

Í dag hava nógv gloymt, at Tony Blair næstan setti ta politisku tyngdarlógina úr gildi í 1997. Tá vann hann ein rættiligan stórsigur, eftir at bretar høvdu havt konservativt stýri uttan slit í átjan ár, og tað vóru 22 ár, síðani arbeiðaraflokkurin seinast hevði vunnið eitt val. Tað var ikki av ongum, at politiskir eygleiðarar í 1983 fóru at tosa um, hvørt arbeiðaraflokkurin nakrantíð fór at gerast so frægur aftur, at hann fekk stjórnarvaldið.

– Tað er hesum manninum fyri at takka. Uttan hann vóru vit ongan veg komin. Soleiðis fagnaði ein av teimum nýggju ráðharrunum Blair á einari gøtuveitslu í London nakrar dagar aftan á valsigurin fyri seks árum síðani.

Men tann nývaldi forsætisráðharrin kom ikki við lyftum um alt tað, sum tann nýggja stjórnin skuldi fáa av skafti. Hann var tvørturímóti eyðmjúkur og varin:

– Vit eru ikki vorðnir harrar. Tað er fólkið, sum ræður, og vit eru fólksins tænarar, og tað fara vit ongantíð at gloyma, segði hann. Orðini fulla í góða jørð hjá teimum víðgongdu bretsku fakfelagsleiðarunum, sum framvegis høvdu standmyndir av Lenin á skriviborðinum. Men at bera Blair saman við hesar fakfelagsleiðararnar og teirra áhugamál er næstan sum at bera teir saman við jarnkvinnuna og fakfelagsknúsaran Thatcher.

### Ikki sum hinir

Sjálvt um Blair stendur á odda fyri bretska arbeiðaraflokkinum, hevur hann einki tilknýti til flokkin sum eina sosiala rørslu. Tey reyðu fløggini og vakurt orðaðar samtyktir á landsfundum telja ikki nógv í hansara hugaheimi. Tað kom eisini skjót til sjóndar, og longu tvey ár aftan á tann fyrra valsigurin lýsti ein av teimum gomlu sosialistunum í arbeiðaraflokkinum sína misnøgd við tann nýggja leiðaran:

– Hesin maðurin hevur ikki minsta skil fyri, hvussu sosialistar hugsa, segði Ken Coates.

Kanska ikki so løgið, tí Tony Blair átti av røttum at verið konservativur. Blairættin flutti til Avstralia, beint eftir at hann var føddur. Pápin kom sær skjótt fram í konservativa flokkinum, og sonurin sá oftari pápan á sjónvarpsskíggjanum enn heima við hús. Men pápin gjørdist sjúkur, og tað bar í sær, at húskið kom at liva í trongum fíggjarligum korum, og tað var júst tann vantandi almenna umsoganin fyri teimum sjúku, sum gjørdi, at tann ungi Blair fór upp í arbeiðaraflokkin.

– Tað almenna heilsuverkið er eftir mínum og floksins sjónarmiði grundarsteinurin undir tí, sum heldur okkum saman, skal Blair hava sagt meiri enn einaferð.

So skjótt hann var vorðin forsætisráðharri, setti hann sær fyri at verða valdur aftur. Tey, sum høvdu atkvøtt fyri Labour fyrru ferð, skuldu eisini atkvøða fyri flokkinum aðru ferð, segði hann. Tað fyrra valskeiðið var tað ikki tann vanligi arbeiðaraflokspolitikkurin, sum merkti dagsskránna, og tað var tí ikki so løgið, at onkrir av hansara fremstu stuðlum vildi hava at vita, nær flokkurin fór at vísa, hvat hann ætlaði at nýta valdið til. Men Blair lat seg ikki ávirka – heldur ikki aftan á annan valsigurin. Ístaðin fyri hevði hann nú vent eygunum ímóti altjóða politiska pallinum.

### Á eggini

Kríggið ímóti Irak og avgerðin hjá vápnaserfrøðinginum David Kelly at taka lívið av sær eru meginorsøkin til, at Tony Blair nú stendur úti á eggini og stríðist fyri sínum politiska lívi. Men ikki minni týdning hevur tað, at veljararnir hava mist álitið á, at hann umboðar nakað nýtt ella nakra broyting, skrivar norski tíðindamaðurin Carsten Bleness úr London.

Blair er fyrst og fremst radikalur, tá talan er um at reka politikk, og hann er ein av teimum politikarunum, sum nýta fjølmiðlarnar sum amboð. Tann kristni nýmoralisturin og avgjørdi fráhaldsmaðurin verður ofta lýstur sum ein spegilsmynd av fyrrverandi amerikanska forsetanum, Bill Clinton, sum eisini er ein tann týdningarmesta fyrimyndin hjá Blair.

Tony Blair ger einki og sigur næstan heldur einki, fyrr enn hann hevur ráðført seg við sínar fjølmiðlaráðgevar. Hann legði ikki fingrarnar ímillum, tá hann fýltist á, hvussu kongsættin handfór vanlukkuna, tá Diana prinsessa doyði, og hetta fekk eisini ta ávirkan, at hann ikki bert bleiv umrøddur sum forsætisráðharri, men eisini sum ein statsmaður. Tað hevur eisini gjørt, at hann er ein, sum umheimurin lurtar eftir í altjóða kreppustøðum, har hann eisini hevur víst síni serligu evni at koma í samband við onnur.

### "Tænarin" horvin

Men nú er skjótt langt síðani, at Blair var ein "fólksins tænari". Kríggið í Irak og málið um David Kelly hava víst, at tað er eisini eitt mark fyri, hvussu nógvum ósannindum ein væl smurd propagandamaskina kann hjálpa honum burturúr. Tann royndi politiski tíðindamaðurin hjá The Times, Matthew Parris, hevur í álvara spurt, um Blair nú er farin at vísa sítt vitloysi.

– Ofta er tað so, at serliga góðar gávur og vitloysi ganga hond í hond, og hetta hevur víst seg at vera meiri vanligt hjá politiskum leiðarum enn hjá øðrum. Stórum leiðarum tørvar sjáldsama stórt sjálvsálit. Tað slepst næstan ikki undan, at leiðarar við áræði nýta ein part av sínum lívi til at kenna seg vísar í tí óvissa, sannførdir um tað, sum ikki letur seg gera, sigur Matthew Parris. Og hann heldur fram:

– Blair roynir at leita sær skjól í einum vónleysum bjartskygni. Tað tykist, sum at hann hevur lovað amerikanarunum, at hann er førur fyri at loysa trupulleikarnar í Evropa, og at hann hevur sagt Evropa, at hann kann temja USA.

Eygleiðarar eru á einum máli um, at Tony Blair hevur átikið sær í meiri lagi. Hann hevur lovað, at Bretland skal gera nakað við teir ovurstóru trupulleikarnar í triðja heiminum, hann ætlar sær lutin sum tann leiðandi statsmaðurin í Evropa, og at hann skal halda í teymarnar á Bush í Washington. Hann skal loysa kreppuna í Miðeystri, men hevur framvegis ikki megnað at fáa skil á viðurskiftunum í Norðurírlandi.

### Frá næsta ár?

Patrick Dunleavy, sum er professari á London School of Economics, sigur við norska Aftenposten, at tað krevst sera nógv av einum bretskum leiðara.

– Tað er nógv truplari at vera bretskur forsætisráðharri enn at vera franskur ella týskur stjórnarleiðari. Bretskir leiðarar royna at spæla ein týðandi leiklut á altjóða pallinum - ein leiklutur, sum er nógv størri enn tað vald, sum teir veruliga hava. Hetta ger, at teir slítast skjótt, bæði likamliga og sálarliga. Longu undan krígnum við Irak sóu vit, at Blair var farin at gera mistøk. Kanska ikki so stór og álvarssom, men tó so, at tey vaktu ans, sigur professarin. Sjálvur heldur hann, at tíðin hjá Blair er farin at styttast.

– Eg dugi ikki at síggja, at hann fer at fáa nakran byrð tað næsta árið. Alistair Campbell, kunningarstjóri, er farin frá, og skjótt noyðist Geoff Hoon, verjumálaráðharri, eisini frá, og tað fer andstøðan at gera sær dælt av. Kríggið í Irak sær út til at halda fram, og tann grundleggjandi trupulleikin hjá Blair er, at hann fekk ongantíð fólkið at taka undir við krígnum. Irakfrágreiðingin, sum skuldi sannføra fólkið um kríggið, er ístaðin vorðin ein trupulleiki afturat. Kally-málið hevur eisini fingið veljararnar at missa álitið á Blair. Eg vænti, at vit kanska fáa ein nýggjan leiðara longu næsta vár, sigur professarin í London við Aftenposten.

